Dimmalætting
Fríggjadagur
Nr. 175 • 118. árgangur • 17. november 1995 • Tlf. 11212 • Fax 10941
– ÁLÍTANDI TÍÐINDI
7kr.



»Úr Luftini«
við SV- og ÚF-skránni
Í BLAÐNUM Í DAG


# Stórur áhugi fyri Drelnesi

**Olja:** Fyrsta fyritøkan hevur longu søkt um loyvi at brúka økið á Drelnesi sum útgerðarhavn. Og fleiri liggja framvið, m.a. í Aberdeen.

PÓL Á KLETTI

Herfyri bjóðaði Tvøroyrar Kommuna út økið á Drelnesi til ídnaðarvirksemi. Nú oljuvinnan er í uppkomu, verður kanska serliga litið at økinum sum útgerðarhavn í tí sambandi.

Ráðgevarar eru Petro Marr í Havn, Pauli Einarsson, ið hevur siglt sum maskinmeistari við seismikkskipi hjá Western, og Graham Stewart, sum starvast hjá PSTI í Skotlandi.

Hesir mynda ein stýrisbólk saman við umboðum fyri kommununa.

Johan Mortensen, stjóri á Petro Marr, sigur, at tað longu nú er spennandi áhugi fyri virksemi á økinum. Umframt tvey føroysk feløg – eitt skipafelag og eitt flogfelag – liggur eitt (olju)útgerðarfelag í Aberdeen framvið.

Umboð fyri felagið í Aberdeen, Seafort Maritime, koma til Føroya mánadagin at kunna seg um umstøðurnar á Drelnesi og tingast um eitt »basu«-samstarv.

Felagið er eisini sinnað at tingast við umboð fyri vinnulívið í Suðuroy – eitt nú skipasmiðjuna í Vági. Men eisini vinnufyritøkur aðrastaðir í Føroyum hava áhuga felagsins í hesum sambandi.

Tað fyrsta felagið hevur formelt søkt um loyvi at leiga seg inn á økið. Annars hava fleiri aðrar fyritøkur havt fyrispurning frammi.

– Næsti mánaður verður avgerandi, um farið verður undir royndarboringar í Lopra, og um ein semja fæst við bretar um markið. Tá hesi viðurskifti eru greið, eru ræsir ruddaðar fyri meira seriøsum kommerciellum samstarvi millum føroyingar og marknaðin uttan um okkum, sigur Johan Mortensen, Petro Marr.



*Kavin, sum legði seg í vikuni, hevur ikki havt stórvegis skaðar við sær. Ofta plaga óhapp at henda í ferðsluni, men so var ikki hesaferð. Verri var hjá fótgangarunum, m.a. hesum manni, sum var á veg niðan eina brekku í Havn hósdagin*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Fyrsti kavin í vetur

**Kavi:** Fólk vóru fyrireikað, nú kavin legði seg fyri fyrstu ferð í vetur, og eingi stórvegis óhapp eru hend.

Landið varð klætt í kava í vikuni. Kavin skuldi ligið í morgin eisini, men verður hetta helst av á hesum sinni.

Longu sunnudagin fer hitin upp um frostmarkið, og kavin fer helst at hvørva.

Frá kava verður skift yvir í tað heldur sjaskuta veðrið í komandi viku, siga veðurmenninir. Tað verður skýggjað við vátaslettingi og regni av og á.

Tá vit í gjár tosaðu við løgregluna, varð sagt, at einki stórvegis óhapp varð fráboðað.

### Sóu hálkuna

Vanligt er at nøkur ferðsluóhapp henda, tá kavin legst fyrstu ferð.

Av politistøðini í Havn varð sagt, at verri er, um kuldin kemur uttan kava, og svartakálk legst á vegirnar.

Hesaferð kundu bileigarar síggja kavan, og tí varð ansað serliga væl eftir í hálkuni.

# Ivan: Norðmenn áttu at sýnt størri vilja til samstarv

**Sildastríð:** Í løtuni er fundur í London um m.a. norðhavssildina. Føroyar eru umboðaðar á fundinum, men longu nú hava norðmenn víst seg at ganga egnar leiðir. Men Ivan Johannesen, landsstýrismaður undrast ikki yvir støðutakan Noregs.

PÓL Á KLETTI

– Men taktiskt hevði tað verið klókari av norðmonnum at tikið okkum aðrar upp á ráð, sigur Ivan Johannesen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Tað eru fýra lond, sum eiga rættindini í sjónum, har norðhavssildin ferðast. Talan er um Føroyar, Ísland, Rusland og Noreg. Tey verða eisini nevnd strandalondini.

NEAFC er felagsskapur, sum stendur fyri fiskiskapi í altjóða sjógvi, og umvegis henda felagsskap vil m.a. ES hava sín part av sildini.

Tey fýra strandalondini hava gjørt kanningar av stovninum, og hesar hava víst, at hann er væl fyri. Mett var, at kvotan kundi ásetast til eina millión tons um árið.

Hetta kom fram fyri mánaði síðan á fundi í Moskva, millum tey fýra londini.

Tey skulu møtast seinni í ár í Havn at tingast um býtið.

Men longu nú eru norðmenn farnir at ganga sínar egnu leiðir.

Í vikuni boðaði Noreg frá, at tað av sínum eintingum ásetti kvotuna til eina millión tons – sama tal, sum strandalondini vóru samd um skuldi ásetast, sambært kanningunum, sum kunngjørdar vórðu í Moskva.

Norðmenn gera samstundis krav upp á 90 prosent av veiðuni.

Læsið á síðu 4

# Spurningar til Bjarta Mohr og Poul Michelsen

**Ikki at hitta:** Striltið hevur gingist hjá Dimmalætting at fáa fatur á leiðlsuni á Føroya Fiskavirking og Fiskasøluni seinastu fjúrtan dagarnar. Tískil sveima leysasøgur um samanlegging, húsagang og kassakredit framvegis í leysum lofti.

Tí halda vit tað vera eina roynd vert at seta spurningarnar fram alment.

Dimmalætting kundi hugsað sær at sett Fiskavirking tveir ítøkiligar spurningar:

1) Eru søgurnar í Oyggjatíðindi um eina samanlegging við Fiskasøluna rættar? (hesin spurningur er eisini til Poul Michelsen).

2) Er tað satt, at lítli kassakreditturin hjá Fiskavirking upp á 35 milliónir krónur er størsta forðingin fyri, at Fiskavirking ikki sjálvt stendur fyri øllum søluarbeiðnum av egnum fiskaúrdráttum.

Fleiri blaðmenn á Dimmalætting hava roynt at fáa fatur á Bjarta Mohr og Poul Michelsen, fyri at fáa teirra viðmerking til hesi tíðindi, men hvørgin teirra hevur verið at hitt seinastu fjúrtan dagarnar.

M.a. hevur Bjarti Mohr lovað at ringt aftur fleiri ferðir. Tað hevur hann ikki gjørt.

## Í BLAÐNUM Í DAG



### Fótbóltsdystir áttu at verið hálvan tíma styttri

Tað gekk sum so ofta fyrr. Føroyska fótbóltslandsliðið megnaði at halda fast í ein tíma, men so var krútið uppi, og griksku álopini skolaðu oman móti føroyska málinum. Tá ið avtornaði, vann Grikkaland 5-0.

Síða 7

### Eimskip brettir upp um armar

Eimskip, sum hevur havt deild í Føroyum í nøkur ár, er farið undir stórar broytingar á farmaleiðini. Umleggingin hevur við sær, at vørurnar koma skjótari til og frá marknaðinum.

Síða 4

### Framtaksgrunnurin ber seg skammiliga at móti vágbingum

Stendur tað til landsstýrismannin í vinnumenningarmálum, verður nevndin í Framtaksgrunninum tveitt hagar grátur og tannagrísl eru. Orsøkin er ein rættiliga ljótur atburður, nevndin hevur sýnt móti Southern Seafood í Vági.

Síða 5

### 50 ár síðani Nürnberg

Nú eru skjótt 50 ár síðani nazistayvirmenninir sótu ákærdir í víðagitnu Nürnberg-prosessini. Nú hevur høvuðsákærin í rættarsakini givið út endurminningar, har hann millum annað setur spurnartekin við, um tað var rættvíst ella um alt bert snúði seg um hevnd.

Síða 10

### Annað bind um Janus útkomið

Í øðrum bindi av ævisøguni um J.H.O. Djurhuus sigur Hanus Andreassen, søgusigari, m.a. frá viðurskiftunum millum skaldið og Onnu Í Hvannasundi. Tey giftust í 1904, men hjúnalagið var ikki uttan trupulleikar.

Síða 15









FARVE